# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Sama hvat hendir, mæla vit staðiliga Turkalandi frá at senda hermenn um irakska markið*

*(Talsmaður hjá Hvítu Húsunum)*

# Bleiv bilurin við Dianu trýstur av vegnum?

**Bilurin, sum Diana prinsessa og Dodi al-Fayed vóru í, kann hava stoytt saman við ein annan bil, bein áðrenn hann rendi á**

Fransmaðurin Jean-Claude Catheline og kona hansara Annick vóru í gjár til avhoyringar hjá teirri serligu nevndini, sum kannar vanlukkuna, tá Diana prinsessa, Dodi al-Fayed og bilførari teirra, Henri Paul, doyðu í einum tunli í miðbýnum í París fyri tíggju árum síðani.

Catheline-hjúnini vóru úti og spákaðu fram við Seinenánni beint við tunnilsmunnan um náttina tann 31. august 1997. Tey halda uppá, at tey sóu tveir dimmar bilar koyra inn í tunnilin undir liðini á hvør øðrum. Løtu seinni hoyrdu tey eitt buldur og hvin frá bildekkum.

- Beint eftir at vit høvdu sæð teir báðar bilarnar, hoyrdu vit eitt ljóð, og tað ljóðaði, sum at tveir bilar stoyttu saman ella bóru við hvør annan. Hetta var beint áðrenn teir báðir bilarnir hvurvu inn í tunnilin, greiddi Jean-Claude Catheline kanningarnevndini frá.



*Mercedes-bilurin við Dianu prinsessu og Dodi al-Fayed*

## Nógv færri doyggja nú av krabbameini

**Altsamt færri, sum fáa krabbamein, doyggja av sjúkuni. Í USA tosa granskarar um eina beinleiðis vend**

Tað ljóðar kanska ikki av so nógvum, men sambært amerikanska krabbameinsfelagnum er tað einki minni enn ein vend, at talið á fólki, sum doyðu av krabbameini, minkaði tvey prosent í árunum frá 2002 til 2004.

Amerikonsku hagtølini vísa, at munandi færri menn doyggja nú av lungna-, prostata- ella endatarmskrabbameini, og hjá kvinnunum er fallið serliga sjónligt hjá teimum, sum hava krabbamein í bróstunum ella tarmunum. Hinvegin veksur talið á kvinnum, sum doyggja av lungnakrabba, men tað veksur ikki so skjótt nú sum fyrr.

Amerikonsku granskararnir halda, at ein orsøk til, at færri doyggja av krabbameini nú enn fyrr, er betri eftirlit við royking, at fólk koma fyrr til kanningar, og at viðgerðin er batnað. At færri kvinnur doyggja av bróstkrabba kemst sambært granskarunum av, at hormonnýtslan er minkað.

Í USA verða 1,4 millión nýggir tilburðir av krabbameini skrásettir á hvørjum ári, og meiri enn triði hvør sjúklingur doyr av sjúkuni.

## Ákærdur fyri at hava hjálpt Saddam Hussein

**Amerikanski heryvirmaðurin William H. Steele var ein av fangavørðunum hjá Saddam Hussein. Nú er hann ákærdur fyri at hava hjálpt honum**

Tann 30. desember í fjør varð Saddam Hussein tikin av døgum. Tveir mánaðir seinni varð ein av amerikonsku fangavørðum hansara, oberstinum William H. Steele, tikin og skuldsettur fyri at hava hjálpt gamla irakska leiðaranumí fongslinum.

Í gjár kom William H. Steele fyri rættin. Har kom fram, at hann er ákærdur fyri at hava „hjálpt fígg-indanum" við at hava útvegað Saddam Hussein kubanskar sigarir og fyri at hava lænt summum fangum sína fartelefon. Herumframt vil ákæruvaldið William H. Steele hevði ov gott samband við eina døttir Saddam og ein av tulkunum í fongslinum.



*William H. Steele og Saddam Hussein, tá Saddam var fyri rættinum í Bagdad í juli í 2004*

Verður William H. Steele funnin sekur, kann hann missa arbeiðið hjá amerikanska herinum.

**STUTT SAGT**

## Julia skal stýra

Í Ukraina eru flokkarnir aftan fyri ta appelsingulu kollveltingina vorðnir samdir um at skipa stjórn aftan á tjóðartingsvalið fyri fjúrtan døgum síðani. Alt bendir á, at Julia Timosjenko, sum er kend fyri sínar sjáldsomu, ljósu fléttur, verður forsætisráðharri í nýggju stjórnini. Nýggja stjórnin hevur ein tepran meiriluta í tjóðartinginum, men flokkurin hjá Juliu Timoskenko hevði eitt sera gott val. Hin flokkurin í samgonguni er flokkurin hjá Viktor Justsjenko, forseta.

## ES herðir móti Burma

Uttanríkisráðharrarnir hjá ES-londunum hava samtykt at herða tiltøkini ímóti hernaðarstýrinum í Burma. Tey nýggju tiltøkini, sum koma í gildi beinanvegin, eru ætlað at raka millum annað træídnaðin, sum er ein týdningarmikil vinnugrein í Burma. Fyrr hevur ES bannað burmesiskum generalum og embætismonnum innferðarloysi til ES-londini, og teirra peningur í evropeiskum bankum er innistongdur. Franski uttanríkisráðharrin segði í gjár, at ES umhugsar at senda eina sendinevnd til Burma at eggja hernaðarstýrinum til at fremja demokratiskar nýskipanir.

## Býta lík

Ísrael og Libanon lótu í gjár hvør øðrum lík av galnum hermonnum. Líkini av tveimum limum í Hizbollah, sum doyðu í krígnum millum Hizbollah og Ísrael í fjør, vórðu latin libansku myndugleikunum. Afturfyri fekk Ísrael leivdirnar av einum ísraelsmanni, sum druknaði úti fyri ísraelsku strondsini í 2005. Líkið rak við streyminum inn um libanska markið, har Hizbollah tók sær av tí.